# Fiskivinnuskúlin



Fiskivinnuskúlin í Vestmanna er ein alternativ miðnámsútbúgving, sum leggur serligan dent á náttúru og tilfeingi og gevur atgongd til víðari lesnað á hægri lærustovnum í Føroyum og uttanlands.

Skúlin húsast í nýggjum hølum á gomlu ferjuleguni í Vestmanna. Eftir nógv ár í trongum hølum er Fiskivinnuskúlin nú sera nýmótans, og hann er útgjørdur við øllum hugsandi hentleikum.

Umframt vanligu skúlaundirvísingina verður eisini farið út í vinnuna og út í náttúruna av og á. Til dømis verður vitjað á almennum stovnum og virkjum av ymsum slag.

Útbúgvingin gevur eitt HIF-prógv, sum kann sammetast við HH- og HT-prógv. Felags fyri hesar tríggjar útbúgvingar er, at talan er um yrkisgymnasialar útbúgvingar. Prógvið gevur sostatt førleikar bæði til vinnulívsarbeiði og hægri lestur. Undirvísingin er skipað soleiðis, at fyrsta árið er eitt støðisár og síðani eru tvey ár við bæði vallærugreinum og kravdum lærugreinum.

Á Fiskivinnuskúlanum verður undirvíst í yrkisgymnasialum lærugreinum á C-, B- og A-stigi, men annars leggur skúlin serligan dent á tilfeingi, náttúru, íverksetan og verkætlanararbeiði. Fiskivinnuskúlin tekur ein flokk inn árliga, og hann byrjar eftir summarferiuna. Tað vil siga, at 24 næmingar byrja hvørt summar.

**www.fiskvest.fo**



# Klaksvíkar Sjómansskúli

Sjómansskúlin í Klaksvík bjóðar tríggjar útbúgvingar.

Skiparaútbúgvingin tekur 1,5 ár.
Skiparaútbúgvingin gevur rætt til at vera stýrimaður og skipari á øllum støddum av fiskiskipum. Eisini gevur skiparaprógvið rætt til at vera stýrimaður ella skipari á handilsskipum upp til 3000 BT.

Fyri at sleppa inn á skiparaútbúgvingina krevst 12 mánaða samlað siglingartíð við skipum yvir 20 BT, tó 3 mánaðir av hesum við fiskiskipum yvir 20 BT. Harumframt krevst sjón- og hoyrnarroynd (bláa bók), ið er yngri enn 3 mánaðir. Hevur tú tikið Sjóvinnuskúlan, so gevur tað 9 mánaða siglingartíð.

Frálæra á sjóvinnuflokkinum tekur seks mánaðir, og tikið verður inn í januar og í august. Útbúgvingin svarar til tað, sum í Danmark eitur Søfartsskolen, og sum í Danmark er kravt fyri at kunna mynstra. Her heima verður útbúgvingin í stóran mun tikin av teimum, ið ætla sær víðari til navigatør. Hetta skúlaskeiðið gevur gott grundarlag undir víðari nautiskari útbúgivng. Fleiri av næmingunum taka umframt sjóvinnuflokkin eisini dugnaskapasskeið í sigling, sum gevur loyvi at føra bátar upp til 100 tons út á 30 fjórðingar.

Kokkaútbúgvingin, sum hevur verið á Klaksvíkar Sjómansskúla er tikin av, og í staðin ber til at taka matvørútbúgvingina, sum Tekniski Skúli í Klaksvík bjóðar. (sí opnuna um Tekniska skúla)

**www.klaknav.fo**

# Kvøldskúlin

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur eina ørgrynnu av ymsum skeiðum, bæði bókligum og kreativum. Flestu skeiðini eru ársskeið, sum byrja eftir summarferiuna, men nøkur eru eisini, sum byrja eftir nýggjár. Alt fleiri ynskja styttri skeið, ið eru ymiskar tíðir á degnum, og sum skifta ofta. Tí bjóðar Kvøldskúlin eisini fram eina røð av styttri skeiðum, vikuskiftisskeiðum, morgunskeiðum og skeiðum fyri 2 ættarlið

Skeiðini eru býtt í tríggjar bólkar: »Almenn frítíðarundirvísing«, sum er fyri øll yvir 14 ár. »Serstøk frítíðarundirvísing«, sum fevnir um royndarfyrireikandi undirvísing, serundirvísing og yrkiskenda undirvísing fyri øll, sum eru fylt 14 ár. At enda bjóðar kvøldskúlin eisini »frítíðarvirksemi«, sum er fyri børn og ung undir 25 ár. Kvøldskúlin skipar harumframt eisini fyri undirvísing fyri tilflytarar, eins og nakrar lærugreinar eru fyri fólk við skerdum førleikum. Millum nýggju tilboðini eru skeið fyri orðblind, fyri skrivi- og lesiveik og skeið í teknmáli.

Á kvøldskúlanum kanst tú ganga til alt frá ættargransking, foto, glaslist, ymisk mál, blindskrift, svimjing, smíð, matgerð, ja, har eru heilar 183 ymsar lærugreinar í at velja. Skúlaárið fylgir í stóran mun fólkaskúlanum, tó við ávísum undantøkum. Til dømis eru á hvørjum ári ymisk summarskeið. Skeiðini á almennu frítíðarundrivísingini enda við eini stórari framsýning pálmasunnudag.

## SKEIÐ VIÐ PRÓVTØKU:

Kvøldskúlin bjóðar eisini sonevnd "royndarfyrireikandi skeið". Hetta eru lærugreinar á bæði 9. og 10. floksstigi, umframt ymsar lærugreinar á HF stigi. Hetta er eitt tilboð til teirra, ið vilja bøta um próvtalið, soleiðis, at tey kunnu sleppa undir víðari lesnað. Tey, ið hava vánaligt prógv, kunnu sostatt fáa ein eyka møguleika á kvøldskúlanum. Møguleiki er eisini at supplera, um tær manglar onkra lærugrein fyri at sleppa inn á dreymaútbúgvingina. Skeiðini verða tillagað alt eftir, hvør áhugin er.

Eisini skipar kvøldskúlin fyri skeiðum fyri orðblindum, soleiðis, at tey fáa lættari við at koma víðari.

Á martima økinum bjóðar kvøldskúlin Dugnaskaparroynd í sigling og VHF-skeið.

Skeiðini í serstakari frítíðarundirvísing enda við próvtøku.

Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli er bæði í Havn, Kollafirði, á Velbastað og í Nólsoy.

**www.kvoldskulin.fo**





# Skúlin við Áir

Skúlin við Áir er stovnaður fyri at geva vinnutarnaðum møguleika at skúla ella umskúla seg til at fara útbúgvingarvegin.

Skúlin er fyri tey, ið hava rørslutarn og/ella lættari persónligar, sinnisligar ella sosialar trupulleikar.

Skúlin strembar eftir at menna næmingarnar og sjálvsálit teirra, so at teir kunnu koma aftur í tær avbjóðingar, sum samfelagið býður, og at teir har kunnu kenna seg væl.
Alt virksemi er vent móti føroyska samfelagnum soleiðis, at næmingarnir skulu kunna koma aftur á føroyska arbeiðsmarknaðin.

Skúlin hevur mangar og drúgvar royndir við endurbúgving, og tað er út frá hesum fyritreytum, at farið verður til verka.

Skúlin við Áir bjóðar fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. ella partvíst 10. floks prógv) og støðisútbúgving innan handil og skrivstovu (FHS -prógv) Møguleiki er eisini at taka einstakar lærugreinar.

Skúlin er kostskúli og møguleiki er at búgva á kostdeildini.

**www.dugni.fo**

# Studentaskúlar:

Føroya Studentaskúli og HF-skeið
**www.hoydalar.fo**

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoy
**www.shey.fo**

Miðnámsskúlin í Suðuroy
**www.midnam.fo**

# Handilsskúlar:

Føroya Handilsskúli á Kambsdali
**www.fhk.fo**

Føroya Handilsskúli í Havn
**www.fh.fo**